# MS í Íslandi til Føroya við mjólkarvørum




*MS er eitt lutafelag, sum einir 500 mjólkarframleiðarar í Íslandi eiga, og felagið hevur seks framleiðslustøð kring um í Íslandi*

**Millum íslendsku fyritøkurnar, sum kemur higar til lands sum partur av vinnuligu sendinevndini úr Íslandi, verður MS, sum er eitt virki, ið kann samanberast við Mjólkarvirkið Búnaðarmanna**

ÍSLENDSKT ÁTAK
*Vilmund Jacobsen*

MS – ella Mjólkursamsalan, sum virkið eisini verður rópt, er ein marknaðarfyritøka, sum kannar tørvin hjá brúkaranum við tí fyri eyga at bjóða eitt breitt úrval av sunnum og góðum matvørum.

– Vit leggja dent á at framleiða matvørur úr íslendskari neytamjólk, eitt nú ymiskar mjólkardrykkir og mjólkardrykkir við smakkievni, jogurt, skýr og róma.

Fyrisitingarstjórin í MS, Gudbrandur Sigurdsson, sigur, at felagið framleiðir eisini sonevndar probiotiskar mjólkarvørur og føðsludrykkir.

– Málið hjá okkum er at reka fyritøkuna við lønandi rakstri, øktari sølu og munagóðari útbýtan, sigur hann.

Íslendskir handlar og brúkarar hava gjøgnum tíðina vunnið álit á MS.

– Vit hava fleiri fjølbroytt framleiðslustøð, og vit gera tað, vit kunnu fyri at ganga ynskjunum hjá viðskiftafólkunum á møti.

Fyrisitingarstjórin vísir á, at MS hevur drúgvar royndir í at framleiða, menna, marknaðarføra, selja og býta út mjólkavørur.

## Bjóða seg fram

Gudbrandur sigur, at MS er eitt lutafelag, sum einir 500 mjólkaframleiðarar í Íslandi eiga, og felagið hevur seks framleiðslustøð kring um í Íslandi.

– Endamálið hjá okkum við Føroya-ferðini er at økja um søluna av okkara vørum í Føroyum, og vit halda, at vit hava nógv at bjóða føroyskum brúkarum – eisini vørur, sum ikki eru so kendar á føroyska marknaðinum.

Við sær til Føroya hevur Gudbrandur eisini stjóran fyri sølu og útbýtan, Jón Axel Pétursson og stjóran á EMMESS, Leifur Ørn Leifsson.

EMMESS er eitt dóttirfelag hjá MS, og er hin fremsti ísframleiðarin í Íslandi.

– Vit ynskja eisini at bjóða føroyska marknaðinum okkara ísvørur, sigur fyrisitingarstjórin.

Sjálvur hevur Gudbrandur Sigurdsson fleiri ferðir verið í Føroyum, og hann kennir eisini føroyingar.

– Ein av teimum, eg kenni væl, er Eirikur á Høvdamørk, stjóri á Høvdavirkinum í Leirvík, sigur fyrisitingarstjórin, sum er spentur upp á átakið í Føroyum, sigur fyrisitingarstjórin í MS.




